Fuglafjarðar kommuna
Ennivegur 38 · 530 Fuglafjørður · Føroyar
Tlf. 668000 · Telefax 444657/444647

Fuglafjarðar havn
Att. Rólant Højsted, havnastjóri
530 Fuglafjørður

J.nr. 16/00577
Dato: 06. juni 2017
Okkara ref. JFL
E-postur: info@fuglafjordur.fo
Heimasíða: www.fuglafjordur.fo

**Kunning um avgerð býráðinns um loðbátatænastuvirksemi á Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kappingareftirlitinum, dagfest 19. apríl 2017, har víst verður til, at eftirlitið tann 09. desember 2016 fekk kunning um viðurskifti í sambandi við loðsbátatænastivirksemi á Fuglafirði, ið møguliga er í stríð við kappingarlógina.

Í hesum sambandi verður helst víst til skriv frá Advokatvirkinnum v/ Petur Evan Djurhuus til Kappingareftirlitið, dagfest 09. desember 2016 saman við undirliggjandi skjølum, sum kommunan tá fekk avrit. Allir býráðslimir vórðu tá kunnaðir um kæruna, sum løgfrøðingurin sendi eftirlitinum vegna P/F Faroe Agency.

Í skrivinum frá Kappingareftirlitinum verður greitt frá málinum, sum deild er upp í innleiðing, loðslógina, kappingarviðurskifti,, somuleiðis sum § 12, stk. 2, nr. 1, og § 12 stk. 2 nr. 2 í kappingarlógini verða útgreinað.

*Niðurstøðan er:*
Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar býráð á býráðsfundi tann 27. november 2014, har avgjørt varð at staðfesta avgerðina hjá vinnunevndini í kommununi hin 14. apríl 2014, har vinnunevndin avgjørdi, at biðja havnameistaran um at skipa so fyri, at "Pilot" verður fyrstaval til loðs- og oljusperrutænastur" fremur brot á § 12, stk. 1 í kappingarlógini, tí kommunan við at favorisera egna loðstænastutilbúgving og avmarkar møguleikar hjá øðrum loðsbátatænastuveitarum at virka á Fuglafirði.

Kappingareftirlitið vil tí áleggja Fuglafjarðar kommunu um at skipa so fyri, at veitarar av loðsbátatænastum framyvir kunnu kappast á jøvnum føti á Fuglafirði.

Kappingareftirlitið hugsar serstakligar um tær støður, har agentar/umboðsmenn, ið umboða loðsskyldug skip, ikki skulu verða forðaðir í at nýta egnar loðsbátar til at seta loðsin á tað loðsskylduga skipið, og at taka hann aftur av skipinum, tá ið loðsbátatænastan er veitt.

Hetta treytar sjálvsagt, at viðkomandi loðsbátur er góðkendur av Sjóvinnustýrinum og megnar at yvirhalda áserttu freistirnar, sbrt § 3 og 4 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012.

Annars verður víst til skrivligt samskifti millum Kappingareftirlitið og Uttanríkis- & vinnumálaráðum kappingarásetingar í havnaloðslógini, og har ráðið í telduposti, dagfestum 05. apríl 2017 er komið til ta niðurstøðu, at hvat loðsbátavirksemi viðvíkur eru ongar ásetingar í løgtingslóg um havnaloðsing, sum seta kappingarlógina til viks.

Málið hevur verið til viðgerðar á eykabýráðsfundi tann 10. mai 2017 og varð avgerð tikin um eftir tilmæli frá meiriluta í vinnunevndini at ógilda býráðssamtyktina frá 27. november 2014 um, at Pilot skal verða fyrstaval til loðsflutningstænastu á Fuglafirði.

Grundgevingin fyri avgerðini er, at tá ið Kappingareftirlitið, sum hægsti myndugleiki á økinum, er komið til ta niðurstøðu, at Fuglafjarðar kommuna við samtyktini frá 27. november 2014 hevur framt brot á § 12, stk. 1 í kappingarlógini, eiga vit sum kommuna at taka hetta til eftirtektar og seta til viks (ógilda) býráðssamtyktina frá 27. november 2014.

Tað skal verða upp til havnameistaran/Fuglafjarðar havn at umbiðja tær veitingar í mun til loðsvirksemi, sum neyðugar eru.

Kommunan eigur at umhugsa at bjóða út loðsbátatænastuna.

Henda avgerð verður hervið send Fuglafjarðar havn til kunningar.

Vinarligar heilsanir

Sonni á Horni
borgarstóri

// Jákup Frants Larsen
kommunustjóri